Skála-B71 0-1 (0-0):

# So er Skála uppi



*So er tað greitt. Skála hevur fyri fyrstu ferð tryggjað sær umboð í bestu føroysku mansdeildini í fótbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast talan gjørdist um eitt tap í seinna upp- og niðurflytingardystinum móti B71, so kom samlaði sigurin hjá Skála ongan tíð í vanda, og fyri fyrstu ferð er liðið nú at finna í bestu mansdeildini í fótbólti**

UPP-/NIÐURFLYTING
*Jákup Mørk*

Tað man vera langt síðani – um nakran tíð - at so nógv fólk hava verið savnað til fótbóltsdyst á Skála, sum talan var um leygardagin.

Ikki tí at veðrið var so øgiliga nógv betri, enn tað hevði verið seinastu vikuna, men neyvan man fótbóltsliðið hjá Skála áður leikt ein somikið týdningarmiklan dyst, sum talan var um sunnudagin. Talan var um seinna dystin um upp- og niðurflyting, og eftir knúsandi 4-1 sigurin á Sandi fyri viku síðani, mundu flestu skálafólkini halda, at nú skuldi tað verið heilt víst, at Skála skal spæla fótbólt í fyrstu deild.

### Broytt sandoyarlið

Í mun til aðrar dystir, sum B71 hevur spælt hetta árið, vóru stórar broytingar gjørdar á liðnum til seinasta dystin.

Eitt var, at Piotr Krakowski hevði avloyst Kára Reynheim á venjarabeinkinum, men tað var tó á vøllinum, at størstu broytingarnar vóru framdar. Av mongu avbygdarmonnunum, sum í ár hava mannað liðið hjá B71, var bert Bernhard Petersen at síggja, og ístaðin vóru boð send eftir onkrum av gomlu kempunum, soleiðis at holini á vøllinum kundu tippast. Millum annað vóru bæði Páll á Reynatúgvu og Rúni í Soylu at síggja, so tað var sjónligt, at sandoyingar royndu seg við kollveltandi broytingum, til tess at vinna seg aftur inn á Skála.

Við hjálp frá undanvindinum sá tað eisini eina løtu út til, at sandoyingar veruliga trúðu uppá, at tað kundi lata seg gera at venda dystinum. Fyrsta korterið ella so var talan um eitt langt sandoyarálop oman móti illa skipaðu Skála verjuni, og onkur møguleiki spurdist eisini burturúr.

Nærmari enn einum stútara á tvørtræið frá Bergleifi Brimvík komu sandoyingarnir tó ikki, og spakuliga komu skálamenn alt betri við í dystin. Tað vóru serliga teir tríggir á miðásini, Pauli Poulsen, Pauli Hansen og Alexandur Johansen, sum stýrdu spælinum hjá heimaliðnum, men eisini stóðst vandi fleiri ferðir av, tá Marius Joensen streyk upp í høgru.

Størsta møguleikan fekk Pauli Hansen, tá hann brádliga kom at standa heilt leysur, men við einari kvikari fótparadu eydnaðist kortini Waldemar Nowicki í sandoyarmálinum at forða fyri.

### Ongan tíð vandi á ferð

Sum fyrri hálvleikur leið, so kundi ein hildið, at heimaliðið í seinna hálvleiki fór at gera sær dælt av vindinum, og harvið leggja eitt stórt trýst oman á sandoyarmálið. Hetta hendi tó ikki, og størsta orsøkin til tað mundi vera, at vindurin nú var hæsaðu somikið, at talan ikki gjørdist um nakran munandi fyrimun av hesum.

Helst hevur tað tó eisini spælt inn, at Skála ikki hevði fyri neyðini at satsa nakað sum helst. Grovt sagt, skuldu teir bara hava hesar 90 minuttirnar at ganga, uttan at sandoyingar skutu alt ov nógv mál, og tí sóust teir ongan tíð tveita alt fólið fram í royndunum at skora.

Hinvegin gjørdu skálamenn heldur ikki tað mistak at taka alt fólkið aftur, men hildu alla tíðina tveir mans á toppinum. Hetta var við til at forða fyri einum veruligum trýsti frá B71, tí teir máttu eisini ansa eftir møguleikanum fyri kontraálopum. Sjálvsagt eigur at ansast eftir hesum, men tað tóktist tó eitt sindur løgið, at sandoyingar løgdu somikið nógv í verjupartin. Grundað á úrslitið í fyrra dystinum, so var tað sum so líkamikið, um Skála skoraði einaferð. treytirnar hjá B71 vóru framvegis at skjóta fýra mál, men tað tóktist, sum um viljin til hetta ikki var nóg stóru.

Tað eydnaðist tó sandoyingum at fáa eitt mál hampuliga tíðliga í seinna hálvleiki. Rúni í Soylu varð skumpaður í ryggin í brotsteiginum, og úr 11 metrum umsetti Eli Hentze trygt í málið.

### Nøgdir um eitt mál

Hóast hetta ikki var nóg mikið at venda dystinum, so tóktist tað sum um sandoyingar hóast alt vóru nøgdir um at vinna dystin.

Teir høvdu helst sæð beiska veruleikan soleiðis, at tað var vónleyst at vinna við nóg nógvum málum, og tí mundi tað um ikki annað kennast sum ein troyst, at teir hóast alt vunnu seinna dystin.

Sjálvandi hevði Skála vilja vunnið dystin, men tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð, tustu fólk inn á vøllin, soleiðis at ein nærum skuldi trúð, at Skála veruliga hevði vunnið dystin. Tað høvdu tey kanska ikki, men uppflytingin var í øllum førum ein veruleiki, so tað var øll orsøk til at fegnast, og so mundi lagið ikki gerast verri av, at fýrverkið kring vøllin dundi, meðan sjampanjupropparnir vórðu sendir í allar ættir.



*Marius tykist ikki at hava funnið rætta stevið, men hjá Alexanduri er eingin ivi, og tey, sum vóru fyri, fingu karm av gyltu dropunum, sum sprændu úr sjampanjufløskunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum:

**Skála-B71- 0-1 (0-0)**
**0-1: Eli Hentze (br.) 57.**

Skála er í fyrstu deild við samanlagt 4-2

Skála: Leivur Justinussen – Ronnie Hansen, Pauli Hansen, Janus Trygvason – Marius Joensen, Tummas Olsen, Sveinur Justinussen, Pauli Hansen, Kaysten Rasmussen – Bogi Gregersen, Alexandur Johansen
B71: Waldemar Nowicki – Bergleif Sólsker, Ib Mohr Olsen, Bernhard Petersen – Kári Sørensen, Rúni í Soylu, Kári Nielsen, Eli Hentze, Sverrir Kjærbo – Páll á Reynatúgvu, Jónsvein Thomsen



## Grundarlagið er nóg gott

**Síðani Skála vann triðju deild í fjør, hevur elevatorurin hjá liðnum bert gingið uppeftir**

UPPFLYTING
*Jákup Mørk*

Tað var sjálvandi ein fegin liðformaður hjá Skála, sum Sosialurin fekk orðið á, beint eftir at hann saman við liðfeløgunum hevði staðfest, at komandi árið skulu teir spæla í bestu mansdeildini.

Tað er annars bert eitt ár síðani, at Skálamenn kundu erpa sær av at hava vunnið triðju deild, og spurdur, um hann hevði roknað við fyrstu deildarfótbólti, tá teir í fjør vunnu triðju deild, segði Pauli, at tað hevði hann so avgjørt ikki droymt um.

- Vit settu okkuim sum mál at stabilisera okkum í deildini. Hetta mál skuldi millum annað røkkast við at seta Eugen Voda sum venjara. Hann fekk okkum í rættiliga góða venjing frá kappingarársbyrjan, og eftir at vit beinan vegin vóru í oddinum, hava vit sjálvandi roynt at hanga í.

Tað kann kanska ljóðað eitt sindur løgið, men eins og nýggi venjarin soleiðis átti sín lut í góða árinum, so varð hein sagdur úr starvinum fáar dystir undan kappingarloki.

Um hetta sigur Pauli, at sum støðan bleiv, so var hetta eitt neyðugt stig at taka, uttanm at liðskiparin tó vil siga nágreiniliga frá, hvat tað var, sum hendi, tá venjarin varð sagdur úr starvinum.



*- Vit settu okkuim sum mál at stabilisera okkum í deildini, sigur Pauli um árið, sum sunnudagin endaði við at Skála flutti upp úr aðru deild*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Mugu hava styrk

Eftir stóru løtuna, ið sum kunnugt varð grundløgd fyri viku síðani á Sandi, spurdu vit at enda liðskiparan um, hvørjar vónir hann hevur um framtíðar tilveruna hjá felagnum í fyrstu deild.

- Tað havi eg so slettis ikki hugsað nakað sum helst um enn. Tað verður allar helst neyðugt við styrki uttanifrá, men hinvegin haldi eg at fundamentið á liðnum er á eini leið, so heilt ógjørligt verður tað als iki, sigur altso Pauli Hansen at enda.

# Tað skal ganga fyri seg á Sandi



*Vit hava tosað um møguleikan at fáa útlendskar spælarar henda vegin. Tað hava vit havt fleiri góðar royndir av, sigur Eli Hentze millum annað*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sandoyingar hugsa um at styrkja um liðið við útlendskum spælarum, og uttan mun til hvør verður venjari, so skal hann búgva á Sandi**

ÚTLIT
*Jóannes Hansen*

Leygardagin gjørdist tað greitt, at B71 komandi kappingarár skal spæla í 2. og ikki í 1. deild. Tað var ikki akkurát hetta, sum teir á Sandi høvdu vónað og eisini roknað við. Undan kappingarbyrjan hildu teir seg hava fólk til eitt pláss í hvussu so er omanfyri strikuna, men soleiðis gekst tað ikki. B71 vann tríggjar ferðir, eina ferð var javnleikur, og teir løgdu rygg til fjúrtan tap. Samlaði málmunurin var 17–52. Hetta bar níggjunda plássið við sær, og B71 tapti samanlagt kvalifikatiónsdystirnar ímóti Skála 4–2.

Síðstu stigini fekk B71, tá teir í fimtanda umfarinum vunnu 3–2 á heimavølli ímóti HB.

Í fyrsta umfarinum vunnu sandoyingar 1–0 á heimavølli ímóti EB/Streymi, og teir vunnu eisini útidystin ímóti EB/Streymi. Á Sundalagsstevnuni vunnu teir 1–0 og fóru við stóra steypinum og øllum stignum.

### Lokali samleikin

Síðani B71 í 1989 fyrstu ferð kom í 1. deild og tók øll á bóli við at vinna meistaraheitið, hevur tað gingið upp og niður. Í 1990 var B71 í 2. deild, og har vóru teir aftur í 1998.

Í níti árunum vóru bestu úrslitini steypasigurin í 1993 og bronsukrónurnar í 1994. Tá fór at detta burturav meistaraliðnum frá 1989, og síðani fjórða plássið í 1995 hevur tað snúð seg um at halda liðnum í bestu deildini.

Í hesum stríðnum hevur verið neyðugt við fremmandari arbeiðsmegi. Onkra ferðina hava útlendskir spælarar hjálpt til, og í ár hevur meiri enn helmingurin av spælarunum verið aðra staðni frá í Føroyum.

Einasti spælarin, sum var við í 1989 og sum hevur verið við alla tíðina síðani tá, og sum framvegis er B71 spælari, er Eli Hentze. Hann er 31 ára gamal, og hann ætlar sær at vera við aftur komandi ár, tá B71 skal stríðast við ÍF, FS Vágar og Sumba um uppflytingarplássini:

– Tað hava verið nógvar broytingar hjá okkum seinastu árini. Umstøðurnar hava kravt tað. Royndirnar siga okkum, at tað er alneyðugt, at lokali samleikin er sterkur og sjónskur. Tað vil siga, at undir øllum umstøðum skal venjarin búgva her suðuri hjá okkum. Annars er vandin stórur fyri, at talan verður um eitt lið, sum venur á tveimum støðum, og at felagið mest sum hvørvur. Tað er sera óheppið.

### Grundarlagið

Á Sandi eru fleiri evnaríkir og ungir spælarar. Men veteranurin og liðformaðurin heldur ikki, at B71 sleppur undan at leita aðra staðni eftir styrki. M. a. tí tað framvegis er ein veruleiki – hóast tað er nógv meiri arbeiði á Sandi nú, enn tað var fyri fáum árum síðani – at fleiri av ungu monnunum fara burtur.

– Tað var ikki greitt fyrrenn leygardagin, hvar vit skulu spæla komandi ár. Tí er tað nústaðni, at vit fara undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár. Vit hava tosað um møguleikan at fáa útlendskar spælarar henda vegin. Tað hava vit havt fleiri góðar royndir av, sigur Eli Hentze, og hugsar í tí sambandinum eitt nú um málverjan, Waldemar Nowisci, 40 ára gamla pólverjan, sum saman við konuni og børnunum so at siga er vorðin sandoyingur.